# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# TJÓÐARMERKIÐ SJÚTI

Sunnudagin eru liðin 70 ár síðani, at bretska hersetingarvaldið við Frederick C. Mason á odda góðkendi Merkið sum tjóðarmerki okkara.

Tilgongdin tey 21 árini frá tí at ungir studentar í Keypmannahavn skaptu Merkið, til tað loksins av fremmandum varð góðkent sum tjóðarmerki, var mangan baldrut. Er tað nakað, sum føroyingar hava dugað væl at staðið illa saman um, so eru tað stjórnarviðurskiftini og ríkisrættarligu viðurskiftini.

Meðan onnur atlond ella hjálond høvdu ein greiðari vilja, soleiðis at ríkisrættarlig viðurskifti vórðu greidd við fullveldi við sannførandi stórum meiriluta - eins og til dømis hjá grannunum fyri vestan, so vóru føroyingar so sera ósamdir. Og ósamd eru vit enn.

Vit skulu ikki her fara fara at greina, hví so stórur partur av fólkinum ikki vil hava fullveldi, men vit kunnu bara staðfesta, at í Føroyum eru viðurskiftini øðrvísi. Líka mikið hvussu leikað verður í, so er tað bara ein minniluti, sum vil hava fullveldi, meðan ein rímiliga stórur meiriluti – enntá er Sambandsflokkurin komin við á tann veingin – vil hava størri sjálvræði, sum í øllum førum í fystu syftu skal verða innan fyri ríkisfelagsskapin við Danmark.

Men tað reið um snarið fyri sjúti árum síðani, at Føroyar loystu frá Danmark. Tó at Merkið varð viðurkent tá, so hevði tann avgerðin einki við sjálvstýrisstríðið at gera. Hetta var einans ein strategisk avgerð hjá einum fremmandum hervaldi. Men hetta kyndi sjálvsagt undir sjálvsstýrisstríðið – sum av góðum grundum fekk vind í seglini undir hersetingini – og kulmineraði við fólkaatkvøðuni um loysing 14. september í 1946.

Við heimastýrislógini dovnaði sjálvstýrisstríðið – og reystu loysingarrøddirnar vórðu nærum tagnaðar, tá Tjóðveldisflokkurin – sum fuglurin Fønix – reis úr øskuni í 1998, tvífaldaði tingmannatalið – og birti nýtt lív í sjálvstýrisstríðið, sum nú varð til fullveldisstríð. Loysingin var eisini nær fyri 10 árum síðani, men tann møguleikin glapp av hondum - og endaligt punktum setti ávísur tingmaður hjá Tjóðveldinum, sum kvaldi fullveldissamgonguna í 2003.



Meðan flestu føroyingar nú hava flutt seg – og taka undir við onkrum slagi av sjálvstýri – so tykist fullveldi aftur at verða skotið langt fram í tíðina. Orsøkin er helst hin einfalda, at tað framvegis bara er ein minniluti, sum vil hava fullveldi.

Men flaggið eru vit øll samd um – og fegnast um tjóðskaparliga at savnast undir Merkinum. Tillukku við sjúti ára degnum!

**Tað er bert ein minniluti, sum vil hava fullveldi**

# Uppsagdur venjari krevur 290.000 frá B71



Í fjørsummar var Frankie Jensen sagdur úr starvinum sum venjari hjá besta fótbóltsliðnum hjá B71. Sambært leiðsluni í felagnu riggaði samstarvið millum venjaran og spælararnar so illa, at spælararnir kravdu venjaran frá ella góvust teir at spæla.

Leiðslan valdi siga samstarvið við Frankie Jensen upp, hóast partarnir høvdu ein tvey ára sáttmála.

Norðlýsið skrivar, at nú hevur Frankie Jensen kravt endurgjald frá B71 fyri uppsøgnina, og sambært blaðnum hevur hann kravt B71 eftir 290.000 krónum.

– Enn er ikki talan um nakað rættarmál, men vit hava freist til 7. Ma at finna eina semju, og tað vóni eg, at vit megna, sigur Ragnar Fossdalsá, sum er formaður í B71.

Hann heldur, at kravið frá uppsagda venjaranum er órímiligt og sigur, at B71 heilt einfalt ikki kann ganga kravinum á møti.

– Vit kunnu ikki góðtaka at gjalda 290.000 krónum í endurgjaldi, tí teir pengarnar eiga vit snøgt sagt ikki, sigur Ragnar Fossdalsá við Norðlýsið. (Mynd: fotboltur.dk)

*eydun@sosialurin.fo*



**Lættari at stýra eftir fordómum**

HØGNI HOYDAL
KJAK Á SÍÐU 13



**Smáu flokkarnir útgjørdir at gera fortreð**

SÓLVIT SIMONSEN
KJAK Á SÍÐU 24

# Livst so spyrst




Ein heldur øðrvísi lýsing er at síggja í nýggjasta blaðnum hjá Altantsflogi. Tað er kappingarneyti okkara, Dimmalætting, sum ber tey óheftu á álítandi tíðindini, at »Dimmalætting er Føroya einasta avís«.

Men tað veldst sjálvsagt um eygað, sum sær.

»Eg haldi, at eg livi« sang Jógvan Telling einaferð. Vit liva, og vit halda eisini, at Dimmalætting livur. Men livst, so spyrst.

*eirikur@sosialurin.fo*

# Prinsessa í parterapi



Svenska Madeleine prinsessa hevur avlýst brúdleypið hjá sær, sum skuldi verða seinni í ár. Norska Se & Hør heldur seg hava funnið frágreiðingina, tí í blaðnum stendur ein ung norsk kvinna fram og sigur, at hon hevur fjasast við Jonas Bergstøm, sum er sjeikurin hjá Madeleine. Svenska kongshúsið boðaði í gjár frá, at Madeleine og Bergstøm ganga framvegis saman, og Aftonbladet vil verða við, at tey bæði eru farin í parterapi fyri at bjarga teirra forholdi.

*eydun@sosialurin.fo*

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo
Marknaðarleiðari: Jaspur Langgaard
jaspur@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,** sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*